TÓRSHAVNAR KOMMUNA

# Undangóðkenning (prækvalifikatión) í sambandi við útbjóðing av bussleiðini í Tórshavnar kommunu

Bussleiðin í Tórshavnar kommunu skal bjóðast út av nýggjum. Kommunan bjóðar í hesum sambandi áhugaðum arbeiðstakarum, ella samtaki av arbeiðstakarum, at senda inn umbøn um undangóðkenning.

Umbønir skulu latast inn á útboðsportalinum hjá Tórshavnar kommunu. Kunna teg um krøv, mannagongdir og innlatingarfreistir niðanfyri.

## Útbjóðari

Tórshavnar kommuna
Vaglið – Postboks 32
FO-110 Tórshavn

## Slag av arbeiði og vavi

Arbeiðið fevnir um at umsita og reka bussleiðina í Tórshavnar kommunu tíðarskeiðið 2023-2030.

Tórshavnar kommuna ásannaði í 1980-unum, at tørvur var á at betra um almennu samferðsluna í kommununi, tí kommunan vaks við fleiri nýggjum býlingum, til dømis Norðasta Horni, undir Brúnni og Hoyvík.

Í fyrstuni vóru tað fýra arbeiðstakarar, ið høvdu ábyrgdina av kommunalu bussleiðini við leiðunum 1, 2 og 3.

So hvørt sum kommunan og kommunumarkið vuksu, og Kollafjørður, Kaldbak og seinni Velbastaður/Kirkjubøur løgdust afturat, øktist eisini farleiðirnar hjá bussleiðini. Í dag fevnir koyringin sostatt eisini um omanfyrinevndu bygdir.

Í dag veitir og rekur ein veitari tænastuna.

Nú Uttari Ringvegur og fleiri nýggjar útstykkingar eru í umbúna, kann væntast, at koyringin fer at víðkast við enn fleiri leiðum í sáttmálaskeiðnum, sum verður bjóðað út.

## Undangóðkenning

Tórshavnar kommuna ætlar at undangóðkenna 3–5 arbeiðstakarar, tó í minsta lagi 3 arbeiðstakarar, ið sleppa at lata tilboð uppá bussleiðina. Tilboðsgevararnir verða undangóðkendir eftir einari heildarmeting grundað á virkislig, faklig og fíggjarlig førleikakrøv og royndir.

Vit gera vart við, at hevur arbeiðstakari royndir innan kollektiva ferðslu og rakstri av busskoyring, verður hetta tikið við í heildarmetingina, tó treytað av, at arbeiðstakarin eisini verður undangóðkendur.

## Spurningar um undangóðkenningina

Hevur tú sum arbeiðstakari ella samtak av arbeiðstakarum ivamál ella spurningar til undangóðkenningina, kanst tú seta spurningar inni á útboðsportalinum. Á hendan hátt fáa allir veitarar somu kunning.
Vit svara øllum spurningum fram til **mánadagin 26. juli 2021 kl.12**.

## Upplýsingar um arbeiðs- og fíggjarviðurskifti hjá arbeiðstakarum

Fyri at koma upp í part til undangóðkenningina, skulu hesar upplýsingar um fíggjarstøðuna- og arbeiðsroyndirnar hjá arbeiðstakarunum latast Tórshavnar kommunu:

1. Fullfíggjað virkisnavn, bústaður, CVR-nr, telefon- og faxnummar og teldupostur.
2. Virkisfrágreiðing við frágreiðing um virkisstruktur (diagram av hierarki)
3. Eitt fullfíggjað yvirlit yvir arbeiðsroyndir, sum umsøkjarin hevur havt tey seinastu árini.
4. Frágreiðing um, hvussu nógv fólk arbeiðstakarin hevur havt í arbeiði í miðal um árið seinastu 3 árini, um til ber.
5. Upplýsingar um útbúgving og fakligu førleikarnar, ið eru tøkir hjá umsøkjaranum og lyklapersónum í virkinum.
6. Upplýsingar um roknskapartøl fyri 3 tey seinastu uppgjørdu roknskaparárini, undir hesum: nettoumsetning, úrslit eftir skatt og samlaða ogn og skuld (eginogn).
7. Váttan við trú og heiður um gjaldkomna, ógoldna skuld til tað almenna sambært rættarreglum í Føroyum skal verða viðfest.
8. Prospekt um fíggjaravtalu við peningastovn. Undir hesum at felagið hevur fígging til eina nøktandi busspark á 25 mill. kr.

Er talan um eitt samtak av arbeiðstakarum, ið ætla at reka busskoyringina í Tórshavnar kommunu, skal týðiliga tilskilast, hvør er samskipari av samtakinum. Harumframt skulu upplýsingar um førleika, royndir og eginogn sambært omanfyristandandi fyriliggja fyri hvønn einstaka part í samtakinum.

## Aðrar upplýsingar

Tilfarið til undangóðkenning skal latast inn á útboðsportalinum hjá Tórshavnar kommunu. Tórshavnar kommuna ber ongar útreiðslur, ið standast av undangóðkenningini hjá viðkomandi arbeiðsgevara.

Arbeiðið verður bara boðið út í Føroyum.

## Útboðsmannagongd

Avmarkað útbjóðing

## Innlating og freist

Seinasta freist at lata inn umbøn um luttøku er **mánadagin 9. august 2021 kl. 12**

Umsóknin um luttøku skal latast inn á útboðsportalinum hjá Tórshavnar kommunu. Umsøkjarar skulu sostatt, sum tað fyrsta, stovna sínar fyritøkur á útboðsportalinum.

Tá tú stovnar fyritøkuna, verður tú biðin um at flokka fyritøkuna. Her skalt tú syrgja fyri at skráseta fyritøkuna undir vinnubólkinum »Bussleiðin«, sum tú finnur undir høvuðsvinnubólkinum »Ráðgevara- og tænastuvinna«.

## Fráboðan um undangóðkenning

Vit kunngera, hvør er vorðin undangóðkendur, mánadagin 6. september 2021.